## Bussur koyrir millum søvnini

Evnið í ársins Savnsfagnaði er orka. Fyrireikararnir heita tí á tey vitjandi um at lata bilin standa fyri at spara orku. Í hesum sambandi er bussur settur at koyra millum tey fýra søvnini allar fimm dagarnar almenni Savnsfagnaðurin er. Savnsfagnaðurin er, frá mánadegnum 12. oktober til og við fríggjadagin 16. oktober. Savnsbussurin steðgar eisini við vanligu bussstoppistøðini, sum eru á rutuni, so fólk, sum ikki vitja søvnini, eisini kunnu brúka savnsbussin.



## Bleytari køka hesaferð

Á síðunum 4 og 5 í Sosialinum í gjár, har yvirskriftin er bleytari køka hesaferð, eru á seinnu síðuni tvær myndir, sum vísa íløgur og rakstur. Fíggjarlógin 2009 er samanborin við fíggjarlógaruppskotið 2010, men av misgáum er ongin eind og onki navn á myndunum. Eindin til vinstru skal vera 1000 krónur, og reyðu skapini skulu ímynda fíggjarlógina 2009, meðan bláu skapini skulu ímynda fíggjarlógaruppskotið 2010.

# Obama fær friðarheiðursløn Nobels



*Eftir bert knøppum 10 mánaðum í starvinum sum forseti í USA, hevur Barack Obama fingið friðarheiðursløn Nobels. Tað verður mett sum ein tann størsti heiðurin nakar persónur kann fáa* savnsmynd

**Amerikanski forsetin, Barack Obama, hevur fingið friðarheiðursløn Nobels. Tað boðar norska Nobelnevndin frá**

ÚTLAND
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Norska Nobelnevndin hevur í dag handað amerikanska forsetanum, Barack Obama, friðarheiðurslønina hjá Nobel.

Heiðurin fær hann fyri framúrskarandi royndir at styrkja altjóða diplomati og samstarv millum fólkasløg.

Nevndin legði serliga stóran týdning í visiónina um og arbeiðið fyri einum heimi uttan kjarnorkuvápn.

Nevndin sigur, at Obama hevur, sum forseti, skapt eitt nýtt klima í altjóða politikki. Diplomati á fleiri stigum hevur endurvunnið eina týðandi støðu, serliga við vekt á leiklutin, sum ST og aðrar altjóða stovnar kunnu hava.

Dialogur og samráðingar eru betri dámd sum amboð til at loysa sjálvt tær truplastu altjóða ósemjurnar.

Visiónin um ein heim uttan kjarnorkuvápn hevur skumpað undir avdubbingina.

Takkað verið Obama spælir USA nú ein meira konstruktivan leiklut í at taka ímóti stóru avbjóðingunum á veðurlagsøkinum, sigur norska Nobelnevndin millum annað.

Tað er ótrúliga sjáldan at nakar persónur á sama hátt sum Obama hevur fangað uppmerksemi heimsins og givið tess fólkið vónina fyri einum betri heimi, staðfestir nobelnevndin.

Hetta er 108. árið at friðarheiðursløn Nobels verður latin.

# Gass framtíðar orkukelda

**Tey síðstu 30 árini er gassnýtslan í heiminum tvífaldað, og í dag er gass ein líka týdningarmikil orkukelda sum olja og kol.**

GASS
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hetta segði stjórin fyri natúrgass í StatoilHydro, Rune Bjørnson, á altjóða gassráðstevnu í Argentina í gjár, sambært blaðnum Offshore. Mettu gassgoymslurnar í heiminum eru eisini hækkaðar sera nógv. Tey síðstu 20 árini eru gassgoymslurnar hækkaðar við 75%. Gass telur 22% av samlaðu orkunýtsluni í heiminum.

Bæði tað at gass nú kann flytast runt sum flótandi nattúrgass, og at aðrir útvinnuhættir eru funnir síðstu árini, ger, at gass óiva kemur at hava stóran týdning í orkunýtsluni framyvir. Tað, at aðrir útvinnuhættir verða nýttir nú - til dømis „skifergass" - ger, at mettu goymslurnar eru vorðnar nógv størri síðstu árini, sjálvt um nýtslan er hækkað nógv.

Eitt annað, sum ger, at størri fokus verður á gass sum framtíðar orkukelda, er, at minni C02 útlát er í gassi enn í olju, og nógv minni enn í koli.

Hóast øll eygu higartil mest hava verið vend móti oljugoymslum í undirgrundini, so kann gass koma at fáa ein týðandi leiklut millum Føroyar og Hetland í framtíðini. Gass kann nevniliga gerast ein avgerandi partur av menningini av økinum vestan fyri Hetland komandi árini. Stór olju- og gassfeløg leggja í løtuni seinastu hond á eina risastóra útbyggingarætlan í økinum, sum skal seta hol á tær fyrstu gasskeldurnar, ið hava ligið og bíðað. Ein íløga í infrastruktur fer at gera eina gassframleiðslu meira lønandi. Gasskeldurnar liggja eisini so nær føroyska markinum, at verður gass funnið í føroyskum øki, kann tað gerast lønandi at taka tað upp við m.a. at brúka komandi infrastrukturin eystan fyri markið.

